# Eingin tekur

**Fyrr í hesum mánaðinum fylti Ítróttarsambandið fyri Brekað 25 ár. Hesi 25 árini hava brekaðu ítróttarfólkini ferð aftaná ferð umboðað Føroyar í altjóða kappingum, og sjáldan eru tey komin aftur sum av torvheiðum**



ÍSB 25 ÁR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Komandi leygardag verður skipað fyri stórari veitslu í sambandi við, at ÍSB herfyri fylti 25 ár. Eisini verður skipað fyri einum fundi fyri tey norðurlendsku sambondini fyri ítrótt hjá brekaðum. Í leiðsluni í ÍSB dylja tey ikki fyri, at hini norðurlendsku sersambondini hava verið sera dyggir stuðlar í sambandi við strembanina hjá ÍSB at fáa altjóða viðurkenning.

### Hugskotið kom eftir vitjan í Noreg

Tað var í sambandi við eina vitjan hjá Egga Jensen á einari venjingarmiðstøð fyri brekað í Beitostølen í Noreg, at hugskotið til at stovna ein felagsskap innan fyri ítrótt fyri brekað kom. Egga, sum hevur sitið í nevndini í ÍSB øll 25 árini, ið sersambandið hevur verið til, bleiv so hugtikið av norsku venjingarmiðstøðini, at hann gjørdist sannførdur um, at okkurt átti at gerast fyri at skipa ítróttina fyri brekað í Føroyum.

Egga fór tí árið eftir aftur til Beitostølen við ítróttarflokkinum hjá sær á Føroya Læraraskúla. Tey gjørdu eina avtalu við venjingarmiðstøðina um, at tey kundu koma á vitjan, um tey afturfyri høvdu eitt Føroyakvøld fyri teimum, ið hildu til á miðstøðini.

Millum næmingarnar í ítróttarflokkinum hjá Egga var Eydis Eidesgaard av Tvøroyri, og saman við Egga og Jón á Steig, myndaði hon eina fyrireikingarnevnd, ið legði lunnar undir ÍSB.

Tað var tó ein trupulleiki í viðtøkunum fyri ÍSF, sum kundi forða fyri, at ÍSB varð sett á stovn. Viðtøkurnar siga nevnliga tað, at tað skulu verða minst trý feløg innan eina ítróttargrein, áðrenn eitt sersamband verður sett á stovn. Hetta krav megnaði ítrótturin fyri brekað ikki at lúka, men táverandi ÍSF-forsetin, Jógvan Arge, kom tó ÍSB til hjálpar, og hann syrgdi fyri, at eitt undantak bleiv gjørt í sambandi við stovnanina av ÍSB.

Síðani bleiv lýst til stovnandi aðalfund, og tann 10. apríl 1980 bleiv Ítróttarsambandið fyri Brekað sett á stovn.

### Góður stuðul frá grannalondunum

Eitt tað fyrsta, ið nýtstovnaða sersambandið fór undir, var at fáa altjóða viðurkenning bæði við norðurlendskum limaskapi og limaskapi í heimshøpi.

Hetta gekk eisini rættuliga væl. Egga Jensen greiðir frá, at tá ið ÍSB søkti um norðurlendskan limaskap, stúrdu tey eitt sindur fyri, at danir fóru at mæla ímóti, men so var ikki, tí upptøkan bleiv einmælt samtykt á norðurlendskum fundi.

Síðani var farið undir at fáa altjóða limaskap. Hetta gekk eisini væl, og ein av høvuðsorsøkunum til, at tað gekk so væl, var tann, at øll norðurlendsku londini stuðlaðu føroysku umsóknini um altjóða limaskap. Norðurlond eru standa sera sterk í altjóða samstarvinum innan ítrótt fyri brekað og hava tí nógv at siga, tá ið avgerðir skulu takast.

Føroyar blivu upptiknar í ISOD, ið er altjóða felagsskapurin, í 1981 á fundi í París. Tað var Eydis Eidesgaard, ið umboðaði ÍSB á fundinum, og tað tók ikki drúgva tíð at fáa føroyska limaskapin upp á pláss.

Fundarstjórin nevndi føroysku umsóknina, og so var eitt stórt spott sett á Eydis, har hon sat mitt í stóra fundarsalinum. Síðani reistust allir fundarluttakararnir og klappaðu, og harvið var føroyski limaskapurin staðfestur.

### Hava vunnið bæði OL-gull, HM-gull og EM-gull

Tað er einki at taka seg aftur í, at síðani ítrótturin fyri brekað í Føroyum fekk skipaði viðurskiftir, hevur hann verið í einari rúkandi menning. Talið av íðkarum er vaksið støðugt, og óteljandi ferðir eru føroysku íðkararnir komnir aftur frá altjóða kappingum við fullari last av medaljum.

Fyrstu ferð, at íðkarar frá ÍSB luttóku í einum altjóða meistaraskapi, var í 1983, tá ið norðurlandameistaraskapið í svimjing var í Vestmannaoyggjunum. Tá eydnaðist ikki føroysku íðkarunum at fáa nøkur heiðursmerkir við heim aftur, men tað var heldur ikki væntandi.

Tvey ár seinni var skipað fyri NM í svimjing í Finlandi, og tá vann ÍSB sær sítt fyrsta gullmerki. Tað var tann tá einans 15 ára gamla Katrin Johansen, ið gjørdist norðurlendskur meistari. Hetta var byrjanin upp á eina sera glæsiliga tíð hjá Katrin og ÍSB við nógvum heiðursmerkjum fyri framman. ÍSB hevur hesi árini megnað at vunnið bæði OL-gull, HM-gull og EM-gull.

### Ikki bara ein dansur á rósum

Hóast ÍSB størstan partin av teimum 25 árinum, ið sersambandið hevur verið til, hevur havt vind í seglinum, so hevur tað ikki altíð verið ein dansur á rósum.

Egga Jensen minnist aftur á ein kapping í París í 1986. Fyrireikararnir høvdu ikki útvegað nakað føroyskt flagg, og tí var heitt á føroysku luttakararnar um at ganga inn til setanina undir Danneborg, men hesum sýttu føroyingarnir fyri. Teir søgdu bart út, at um tey ikki



*Egga Jensen hevur sitið í nevndini fyri ÍSB øll tey 25 árini, ið ÍSB hevur verið til, og hann verður av mongum mettur at verða Mr. ÍSB*

*mynd: Jens Kr. Vang*



*Johan Samuelsen er ein av eldsálunum í ÍSB. Hann var sjálvur í mong ár virkin innan svimjingina, og hann hevur sitið í leiðsluni í ÍSB bróðurpartin av teimum 25 árunum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Elna Skylv Hansen umsitur til dagligt skrivstovuna hjá ÍSB, og hon syrgir fyri, at alt er í lagi í sambandi við eitt nú ferðir til kappingar uttanlands*

*Mynd: Jens Kr. Vang*